Eingin brei› samgonga

Hóast Javna›arflokkurin í gjár royndi at fáa í lag samrá›ingar um at fáa allar flokkar at vera vi› í einar brei›ari b‡rá›ssamgongu í Tórshavnar b‡rá›, ver›a ta› helst Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin, i› skipa samgongu

SAMGONGU-SAMRÁ‹INGAR
John Johannessen
john@sosialurin.fo

Sí›ani úrsliti› av valinum t‡skvøldi› hava Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin í Havn samrá›st um at skipa samgongu.

Í gjárkvøldi›, eftir at bla›i› var fari› til prentingar, skuldu flokkarnir aftur hava fund. Á hesum fundinum rokna›u flokkarnir vi› at koma ógvuliga nær einari endaligari semju.

– Vit skulu gera eitt nágreiniligt samgonguskjal, tí skulu samrá›ingarnar taka ta› tí›, sum tær nú einafer› taka. Men møguleikin fyri, at vit skriva undir eitt samgonguskjal í kvøld er til sta›ar, seg›i He›in Mortensen úr Sambandsflokkinum, tá vit tosa›u vi› hann á middegi í gjár.

Leivur Hansen úr Tjó›veldisflokkinum var tann einasti, i› beinlei›is helt uppskoti› hjá Tórfinni Smith um eina brei›a samgongu, vera áhugavert

Mynd: Jens Kr. Vang

Møtti ikki

Mikudagin sendi Tórfinn Smith, sum er valdur í b‡rá›i› fyri Javna›arflokkin, eitt bræv til allar n‡valdu b‡rá›slimirnar. Í hesum brævi vísti hann á, at b‡rá›sarbei›i› seinastu mongu árini hevur víst, at so at siga full semja hevur veri› millum allar b‡rá›slimir í so at siga øllum málum.

Tórfinn Smith heldur, at hetta saman vi› skrivingini í sambandi vi› b‡rá›svali›, kann skapa grundarlag fyri einari brei›ari b‡rá›ssamgongu. Tí bey› hann øllum n‡valdum b‡rá›slimum til fundar í b‡rá›ssalinum í Havn klokkan níggju hósmorgunin.

Men fundurin hev›i lítlan áhuga millum hinar flokkarnar. Fólkaflokkurin møtti ikki, og He›in Mortensen úr Sambandsflokkinum bo›a›i frá, at almennar samrá›ingar í løtuni eru millum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin.

Leivur Hansen úr Tjó›veldisflokkinum, sum ikki er vi› í samrá›ingunum um n‡ggja b‡rá›ssamgongu, var tann einasti, i› tók undir vi› hugskotinum hjá Tórfinni Smith.

Forma›urin ikki funnin

Sambært frábo›anunum frá Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum, ganga samrá›ingarnar um n‡ggju b‡rá›ssamgonguna væl. Men flokkarnir hava enn ikki funni› út av, hvør skal eiga b‡rá›sformannin.

– Vit hava ikki beinlei›is umrøtt nakran persón til hendan sessin enn. Vit hava gjørt eina beinagrind til eitt samgonguskjal, sum vit nú skulu byggja ví›ari á, seg›i He›in Mortensen á middegi í gjár.

Mest sannlíka er kortini, at ta› antin ver›ur He›in Mortensen úr Sambandsflokkinum ella Jan Christiansen úr Fólkaflokkinum, i› fer avsta› vi› borgarstjórasessinum.

He›in Mortensen fekk mestar atkvø›ur til b‡rá›svali› t‡sdagin. Hann fekk 630 atkvø›ur.

Jan Christiansen fekk ikki mestar atkvø›ur á Fólkaflokslistanum, men hann hevur av Fólkaflokkinum veri› mettur sum eftirma›urin hjá Poul Mikkelsen, sum ikki stilla›i upp aftur í 1992. Í samgonguni, sum sat frá 1992 til 1996, var› Fólkaflokkurin hildin uttanfyri.

Jan Christiansen er einasta umbo›i› hjá Fólkaflokkinum, sum var› afturvalt í ár. Tí er hann tann einasti, i› hevur politisku royndirnar til at gerast borgarstjóri. Jákup Suni Simonsen hevur politiskar royndir úr Løgtinginum, men júst ta›, at hann er løgtingslimur og harafturat hevur egi› viri›, kann vera orsøk til, at hann ikki tekur av einum tilbo› um at gerast b‡rá›sforma›ur.

Ein annar møguleiki er, at Bjarti Mohr ver›ur b‡rá›sforma›ur. Men hann er n‡valdur og hevur ikki tær stóru politisku royndirnar.

He›in Mortensen vísti Tórfinni Smith á, at Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin í løtuni eru í reellum samrá›ingum um eina samgongu

Mynd: Jens. Kr. Vang

N‡vali› útsett

UPPSKOTI‹ UM N†VAL
John Johannessen

Eingin onnur vi›ger› var av uppskotinum hjá Sambandsflokkinum og Javna›arflokkinum um n‡val á tingfundinum í gjár.

Hetta var kortini ikki av teirri orsøk, at flokkarnir hava tiki› uppskoti› aftur.

Ta› er Jóannnes Eidesgaard, sum hevur heitt á formansskapin í løgtinginum um at fáa vi›ger›ina útsetta orsaka› av, at hann ver›ur burturstaddur restina av vikuni. Hetta hevur Finnbogi Ísakson, løgtingsforma›ur, eftirlíka›.

Onnur vi›ger› av uppskotinum hjá Sambandsflokkinum og Javna›arflokkinum um n‡val, ver›ur helst á dagsskránni fyri tingfundin komandi t‡sdag.

Mynd: Jens Kr. Vang

Tórbjørn standa skúlarætt

Tjó›veldisflokkurin gó›tekur ikki málbrúki› hjá landsst‡rismanninum

POLITIKKUR
Jústinus Leivsson Eidesgaard

Tjó›veldisflokkurin gó›tekur als ikki, at landsst‡risma›urin í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen n‡ti so ógvuslig or› móti løgmanni, Anfinni Kallsberg. Eftir at bla›i› fór til prentingar í gjár, eftir tingfundin, savna›ust ting og landsst‡rismenn hjá Tjó›veldisflokkinum, at vi›gera ógvusligu or›ingarnar hjá Tórbjørn Jacobsen, í samband vi› at hann av sínum eintingum avseg›i grundlógardagin sum frídag í fólkaskúlanum og í sta›in setti altjó›a arbei›aradagin, 1. maj.

Høgni Hoydal, forma›ur í Tjó›veldisflokkinum, kundi einki siga undan fundinum í gjár, um or›ingarnar hjá Tórbjørn Jacobsen fóru at fáa avlei›ingar fyri hann sum landsst‡rismann. Høgni Hoydal kundi bert siga, at slíkt or›alag ikki var› gó›tiki› av flokkinum.

Tórbjørn Jacobsen, landsst‡risma›ur, hevur sett Tjó›veldisflokkin í eina pínliga stø›u vi› at leggja n‡tt afturat starvsl‡sing løgmans. Høgni Hoydal sigur, at flokkurin als ikki kann gó›taka or›alag Tórbjørns

Í gjár stó› Tórbjørn Jacobsen skúlarætt í Tjó›veldisflokkinum

Juliannuboys í Badmintonhøllini

DANSIKVØLD
Tí›indaskriv:

Í anna›kvøld skipar hondbóltsfelagi› Kyndil fyri dansikvøldi í Badmintonhøllini í Havn. Hetta er gjørt, so hvøi ver›ur hjá fólki at fara út at dansa, nú fleiri jólabor› ver›a hildin, sigur Regin Joensen, sum hevur fyrireika› dansikvøldi›.

Ta› ver›a Juliannuboys og vinmenn, sum fara at spæla til dansin. Hendan bólkin, sum var› stovna›ur mi›skei›is í áttiárunum, manna brø›urnir Marner, Jóan Petur og Árni Andreasen, sum eru kendir úr bólkinum Black Birds, sum var› stovna›ur í 1975. Bólkurin Black Birds er tó framvegis virkin, um bo› skuldu veri› eftir honum, lata teir heilsa.

Heiti› »Juliannuboys« ber bólkurin eftir mammu teirra, Julionnu. A›rir limir í bólkinum eru Jóannes Jacobsen og Oskar Eirikson. Tónleikurin, teir spæla, fevnir ví›a, frá country og rock/disko.





Brø›urnir, Jóan Petur, Marner og Árni Andreasen mann bólkin saman vi› Oskari Eirikson